# Svimja um Nólsoyarfjørð leygardagin

**Í sambandi við Ovastevnuna verður skipað fyri svimjing um Nólsoyarfjørð leygardagin. Teinurin um fjørðin er fýra kilometur. Metið eigur Dia Jacobsen, sum hevur svomið teinin upp á umleið fimm korter**



OVASTEVNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fyri áttandu ferð verður skipað fyri svimjing um Nólsoyarfjør í sambandi við árligu Ovastevnuna í Nólsoy, sum verður um vikuskifti. Tað er Erlendur Simonsen, sum skipar fyri svimjingini. Hann er svimjari sjálvur, skipari á Rituni og hevur konu úr Nólsoy. Sum skipari á Rituni er hann í Nòlsoy fleiri ferðir um dagin, men leygardagin fer at so at svimja um fjørðin.

– Vit byrjaðu við hesum tiltakinum í 1998, og var endamálið tá at savna pengar til svimjilhylin í Nólsoy. Hetta tiltakið gevur í sjálvum sær kanska ikki so nógvar pengar, men hetta er eitt stuttligt tiltak, sum fólk leggja til merkis, sigur Erlendur Simonsen.

Erlendur veit um einar 6-7 svimjarar, sum ætla sær við, men fleiri kunnu koma. Tá flest hava verið við, vóru teir 16.

Erlendur leggur dent á, at tiltakið bæði er fyri kappsvimjarar og motiónssvimjarar. Fólk velja eisini sjálv, um tey nýta fitjur ella ikki. Treytin fyri at vera við er kortini, at ein bátur fylgir hvørjum svimjara, og við bátinum skulu vera minst tvey fólk. Harumframt er eisini ein formansbátur, sum skipar fyri navigatión o. s. fr. Harafturat eru eisini samarittar frá Reyða Krossi við.

Erlendur Simonsen sigur, at luttakararnir skulu møta kl. 9 yviri við Strond 22 í Havn, har Radioamatørarnir og Føroya Ellisakfør halda til. Lagt verður á fjørðin kl 10:15, soleiðis at svimjararnir kunnu passa seg eftir sjóvarfallinum – fimm korter fyri vestfalskyrrindini í Nólsoyar bygd. Málið er ærisportrið í Nólsoy.

Tað er kappsvimjarin Dia Jacobsen, sum oftast hevur vunnið. Hann hevur vunnið fýra ferðir og hevur eisini metið, sum er ein tími og 15 minuttir.

Tey, ið ynskja at verða við, kunnu ringja til Erlend Simonsen á telefon 220644.

# Eitt ára fongsul fyri at smugla ecstacy

**Ein 24 ára gamal maður úr Føroyum er í Føroya Rætti dømdur at hava smuglað 422 og eina hálva ecstacy-tablettir til Føroya. Talan er um nógv tað størsta mál av hesum slag í Føroyum. Dómurin var eitt ára fongsulsrevsing**



SMUGLING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var tá Norrøna kom á Havnina úr Hanstholm mánamorguin 11. juli, at ein 24 ára gamal maður var steðgaður í tollinum. Sambært útvarpinum fann tollvaldið 422 og ein hálva ecstacy-tablett í bilinum, og er hetta so nógv tann størsta mongdin av ecstacytablettum, sum tollvaldið í Føroyum nakrantíð hevur lagt hald á.

Undir avhoyringunum hevur maðurin viðgingið at hava smuglað tær 422 og eina hálvu ecstacy-tablettirnar til Føroya.

Hann hevur sagt politinum, at hann hevði ætlanir um at selja helvtina av tablettunum – eitt nú á festivalunum kring landið, meðan hin helvt var til egna nýtslu, sigur útvarpið.

## sonnet

við fjalsins fót eg dvaldi lítið bil.
og hugsaði so lætt um mangt og hvat.
so fagur var mær heimur har eg sat.
mær rann í hug: "hví eri eg nú til?"

tað kemur og tað fer um hjartagrund
ein frískur vindur. gjóstur farnu tíð.
eg minnist hennar andlit. ljós og blíð
hon er og var so eiggiligt eitt sprund.

her sat eg so og lýddi á hvat á-
in hevði mær at siga um ta heild
ið lutast teimum øllum handan deild.

mær komu minni fram og sjónir sá
og eg við mínum hugaheimi læt
sum um tú eins og leda hjá mær sat.

*Christian Fróði Djurhuus*

## sonnet

og stormur um títt andlit ber tær boð
um alt sum eyga sær tá sinni flennur.
og onkuntíð ein løkur frá tær rennur
av eygum køldum ísins kalda log.

og stovan er mær heit. eg leggið við
á bálið sum so brimar mær at holdi.
mær eykaðist ein vetur ið eg toldi.
og droymdi at tú var við mína lið

og summarið sum sólin skygda sær
man bíta millum vinir mínar har
ið allir dreymar kunna síggjast aftur.

tá lýtt og frítt er fyri heystsins stund
ið byggir sær á ymsum ættum grund-
ir til at vinarskarin er mær tættur.

*Christian Fróði Djurhuus*

## sjónett

og evnið er mær breitt at líta á
eg sá ju tað sum eingin annar sá

*Christian Fróði Djurhuus*

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo